# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 26. oktober 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 22.15**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| 1. | **15/00304**<br>**Ummæli til keyp av uml. 40 m² av matr. nr. 428a á Hagaleiti**<br>Umsókn um ummæli til keyp av lendi sum skal leggjast til matr. nr. 428b og fevnir um økið har sum portur verður uppsett til innkoyring til IRF.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndini mælir til at IRF fær loyvi at ogna sær uml. 40 m² av matr. nr. 428a á Hagaleiti. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini.<br><br>*Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |
| 2. | **15/00303**<br>**Umsókn um keyp av uml. 310 m² av matr. nr. U á Hagaleiti**<br>Umsókn er móttikin frá IRF um keyp av lendi frá Eysturkommunu sum skal leggjast til matr. nr. 428b. Økið er til portur ið verður uppsett við innkoyringina til IRF.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at IRF fær loyvi at keypa uml. 310 m² av matr. nr. U sum er kommunal jørð og vegur á Hagaleiti. Rørportrið er ogn hjá kommununi og er ikki við í søluni av jørðini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini.<br><br>*Árni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |
| 3. | **15/00368**<br>**Uppskot til nýtt skeyti til keyp av jørð og vegleiðing til bygging á grundstykki**<br>Í sambandi við at kommunan skal luta út grundstykkir, er gjørt uppskot til skeyti og vegleiðing til bygging sambært býráðssamtykt frá býráðsfundi tann 27. nov. 2014 um kotur, hædd, fráleikar v.m.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 26. oktober 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 22.15**

góðtaka uppskotið til skeytið og til vegleiðingina.

**4. 13/00010**

**Framtíðar skúlaskapur millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu**

Meirlutin í mentanarnevndini, Hanna Jensen og Emma Rasmussen mæla til at býráðið arbeiðir víðari við uppskotinum frá stýrisbólkinum.

Vísandi til uppruna-arbeiðssetningin frá 20 juni 2014, mælir minnilutin í mentanarnevndini Hjalti Dalheim frá, at fylgja uppskotinum hjá Stýrisbólkinum, og mælir til, at kanna aðrar møguleikar, áðrenn fari verður víðari eftir uppskotinum hjá Stýrisbólkinum.

Fyrst var atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í mentanarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Emma Rasmussen, Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Hanus Jacobsen.

Sostatt er tilmæli hjá meirlutanum í mentanarnevndini falli

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá minnilutnaum í mentanarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Hanus Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Emma Rasmussen, Oluffa Joensen

Sostatt er tilmæli hjá minnilutanum í mentanarnevndini samtykt.

**5. 15/00346**

**Umsókn um stuðul – Reysti**

Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti og veita stuðul á 100.000,00 kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmlælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 26. oktober 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 22.15**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**6. 14/00297**

**Umsókn um tilmæli at keypa fjós og lendi matr. nr. 128a í Leirvík**

Málið hevur verið fyri í býráðnum har samtykt er á býráðsfundi tann 26. januar 2015, at festarin fær heimild at ogna sær jørðina við ástandandi fjósi.

Tekniska umsiting hevur kannað eftir um málið verður viðgjørt av Búnaðarstovuni og um tað er farið víðari til Umhvørvisstovuna. Upplýst er frá Búnaðarstovuni, at tað er ikki møguligt loysa matrikul 128a við ástandandi fjósi frá festinum, men at kommunan kann keypa matr. nr.128a við ábygdum fjósi og gjalda eitt endurgjald fyri fjósið til festaran.

Eingin játtan er til keyp av matr. nr. 128a og av fjósinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at festarin kann ogna sær jørðina matr. nr. 128a

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanaarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Hanna Jensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**7. 15/00351**

**Umsókn um frábýti av festinum – matr. nr. 25a í Norðragøtu**

Eysturkommuna hevur fingið umsókn um frábýti av festinum 25a í Norðragøtu. Matr. 25a liggur niðanfyri vegin við Krokusá (beint omanfyri mistaðarøkið) og er partur av ætlan hjá Eysturkommunu (fyrr Gøtu kommuna) – planur Frammistovuvegurin frá 2006 (2 grundstykkir), men er ikki framt í verki.
Eingin játtan er til keyp av jørðini og til

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 26. oktober 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 22.15**

útstykking av 2 grundstykkjum/matriklum. Mettur kostnaður kr. 130.000,00.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at umsøkjarin fær heimild at gera frábýti av festinum mart. nr. 25a í Norðagøtu.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at kommunan ognar sær jørðina mart. nr. 25a sum hevur áseting B sethus og F frítíðar- og mentanarøki.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**8. 15/00374**

**Eykajáttanir oktober 2015**

Neyðugt verður við ymiskum eykajáttanum til arbeiðir sum semja hevur verið um at gjørt, umframt aðrar eykajáttanir.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttanir á íalt 1.060.000,00 kr. samb. fyriliggjandi yrirlitið frá umsitingini. Eykajáttanirnar verða fíggjaðar við at 110.000,00 kr. verða tiknar av konto 1.11.21.510 (kommunufeløg), og rest 950.000,00 kr. verða tiknar av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**9. 15/00382**

**Broyting í byggisamtyktini fyri Haldarsmørk matr. Nr. 1999 í Syðrugøtu**

Í sambandi við útstykkingina í Syðrugøtu er staðfest, at økið sum er lagt út til sethúsaøkið í byggisamtyktini, ikki er í samsvar við fyriliggjandi projekt. Neyðugt verður at broyta linjuna millum øki B2 sethús inn á øki H frílendi sambært fyriliggjandi tekningum, og mælir tekniska umsiting at gera hesa broyting í byggisamtyktini.

Einmælt samtykt at linjan fyri B2 økið verður flutt samsvarandi fyriliggjandi tekningum viðv. útstykkingini í Syðrugøtu.

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



## Býráðsfundur mánadagin 26. oktober 2015 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

## Fundurin lokin kl. 22.15

## Eysturkommunu býráð:

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________